Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	07.03.2023
Mál nr.:	22/19765
Málsviðgjørt:	JH
Ummælistíð:	24.01.2023-21.02.2023
Eftirkannað:	23. februar 2023

Uppskot til

Løgtingslóg
um
talgilda samleikakortið

Alment talgilt samleikaprógv

§ 1. Talgilda samleikakortið er alment samleikaprógv í føroyska samfelagnum.

Umsiting

§ 2. Landsstýrismaðurin umsitur talgilda samleikakortið.
Stk. 2. Umsitingin av talgilda samleikakortinum hevur heimild at heinta og útflýggja upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

Treytir

§ 3. Persónar kunnu fáa talgilda samleikakortið treytað av, at hesir hava talgildan samleika, sbrt. løgtingslóg um talgildan samleika, og góðtaka ásettar brúkstreytir til talgilda samleikakortið.

Børn

§ 4. Foreldur og verjar, ið lúka treytirnar sbrt. § 3, kunnu fáa eintak av talgilda samleikakortinum hjá ómyndugu børnum sínum knýtt at sínum egna talgilda samleikakorti.

Fysiskt samleikakort

§ 5. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um at útflýggja talgilda samleikakortið í fysiskum formi.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann til fysiska samleikakortið, sbr. stk. 1, veita undantak frá kravinum um talgildan samleika, sbr. § 3, við tí treyt, at aðrar tilsvarandi reglur koma ístaðin.

Gildiskoma

§ 6. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Talgildu Føroyar fóru á heysti 2022, saman við Akstovuni, í gongd við at menna eitt talgilt koyrikort á eini app. Av tí at eitt talgilt samleikakort minnir so nógv um eitt talgilt koyrikort, og at gagnvirðið av loysnini økist munandi við eisini at fevna um eitt samleikakort, er talgilt samleikakort vorðið ein partur av loysnini.

Samleikin hevur gjørt tað lættari hjá tænastuveitarum at veita tænastur umvegis internetið. Tað eru tó ikki allir tænastuveitarar, ið veita sínar tænastur á netinum, og sostatt eru framvegis nógvir tænastuveitarar, sum ikki fáa ágóðan av Samleikanum. Samleikakortið loyvir tænastuveitarum at eyðmerkja borgarar/kundar í fysiska heiminum, og kunnu hesir sostatt eisini fáa ágóðan av almennu talgildingini.

Nógvir áhugapartar í føroyska samfelagnum hava tørv á, at borgarin gevur seg til kennar fyri at veita røttu tænastuna. Her kann m.a. nevnast, at borgarar skulu prógva sín bústað fyri at fáa avsláttur frá Strandferðsluni, fáa avsláttur til frítíðarvirksemi frá kommununi o.a. Við einum talgildum samleikakorti við hondina, kann borgarin altíð vátta sínar grundupplýsingar, so sum p-tal og bústað, og harvið vátta rættin til eina ávísa tænastu.

Eysturkommuna, Tórshavnar, Runavíkar, Klaksvíkar, Vága, Nes, Hovs, Vágs, Viðareiðis og Sunda kommuna, umframt Føroya Stiftsstjórn, Strandferðslan og Gjaldstovan/Talgildu Føroyar stuðla menningini av talgilda samleikakortinum fíggjarliga. Hesir áhugapartar síggja stórt gagn í einum talgildum samleikakorti.

Talgilda samleikakortið verður ment sum ein app, ið eisini inniheldur talgilda koyrikortið. Eftir ætlan verður appin klár at taka í nýtslu í fyrru hálvu av 2023.

Talgilda samleikakortið gagnnýtir undirstøðukervið hjá Talgildu Føroyum við Samleikanum, Vanganum og Heldini. Hetta ger, at loysnin verður ment væl skjótari og bíligari, enn um hon varð ment frá grundini av. Eisini merkir hetta, at KT trygdin á talgilda samleikakortinum er á høgum altjóða stigi. Talgilda samleikakortið er undir støðugum eftirliti – bæði av innanhýsis serfrøðingum á Gjaldstovuni og uttanhýsis KT grannskoðarum – umframt at loysnin áhaldandi verður dagførd samsvarandi nýggjastu trygdarváðunum.

1.2. Galdandi lóggáva

Tað er einki alment talgilt samleikaprógv í føroyska samfelagnum í dag. Tað finst heldur ongin serlóggáva um talgilt samleikakort í dag.

Av galdandi almennari lóggávu verður dentur lagdur á, at talgilda samleikakortið lýkur krøvini í dátuverndarlógini, undir hesum krøv um KT trygd, rættindi hjá skrásetta o.s.fr. Dentur verður lagdur á, at loysnin verður gjørd og framhaldandi ment eftir “dátuvernd ígjøgnum sniðgeving” og “dátuvernd gjøgnum standardstillingar” meginreglunum í dátuverndarlógini. Hetta sæst m.a. í, at brúkarin sjálvur kann velja, um hann vil deila sítt p-tal ella bústað, alt eftir um hann metir, at hesar upplýsingar eru viðkomandi í einstaka førinum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at geva talgilda samleikakortinum neyðugu løgfrøðiligu karmarnar, samstundis sum samleikakortið við lógini verður viðurkent sum almenna talgilda samleikakortið í Føroyum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við hesum lógaruppskoti fær Føroyar sítt fyrsta almenna talgilda samleikakort.

Mett verður, at stórir fyrimunir eru við einum talgildum samleikakorti. Borgarin skal javnan geva seg til kennar fyri at fáa atgongd til almennar tænastur frá bæði landi og kommunum.

Tað, at fleiri almennir stovnar velja at stuðla menningini av talgilda samleikakortinum fíggjarliga, vísir, at tørvurin á eini slíkari loysn er stórur í samfelagnum. Til dømis kann samleikakortið verða brúkt um borgarar skulu prógva sín bústað fyri at fáa avsláttur frá Strandferðsluni ella fáa avsláttur til frítíðarvirksemi frá kommununi. Harafturat kann nevnast, at Almannaverkið gevur eitt pensjonistakort til fólkapensjonistar og fyritíðarpensjonistar, sum verður brúkt sum avsláttarkort við bussum og skipum hjá Strandferðsluni. Samleikakortið kann vera eitt ískoyti til pensjonistakortið hjá Almannaverkinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið hevur í tíðarskeiðinum 24. januar til 21. februar 2023 verið til ummælis hjá Løgmansskrivstovuni, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum, Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Vinnuhúsinum, Almannaverkinum, Akstovuni, Alzheimerfelagnum, Fakfelagssamstarvinum, MEGD, Føroya Politi, Kommunufelagnum, TAKS, Gjaldstovuni, Strandferðsluni, Dátueftirlitinum, Føroya Tele, SEV, Vinnustovninum, Visit Faroe Islands og Útoyggjafelagnum.

Uppskotið hevur eisini verið til almenna hoyring á ummælisportalinum hjá landsstýrinum.

Hoyringarsvar er komið frá:
- Almannaverkinum
- Dátueftirlitinum
- Deyvafelag Føroya
- Ferðavinnufelagnum
- KT-felagnum
- Landssjúkrahúsinum
- SEV
- Útoyggjafelagnum
- Visit Faroe Islands

Ummælisskjal og ummæli eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Eysturkommuna, Tórshavnar, Runavíkar, Klaksvíkar, Vága, Nes, Hovs, Vágs, Viðareiðis og Sunda kommuna, umframt Føroya Stiftsstjórn, Strandferðslan og Gjaldstovan/Talgildu Føroyar stuðla menningini av talgilda samleikakortinum fíggjarliga. Mett verður, at kostnaðurin fyri menningina verður umleið 1,6 mió. kr.

Mett verður, at árligi raksturin av talgilda samleikakortinum kemur at liggja um 500.000 kr., og verður partur av rakstrarjáttanini hjá Talgildu Føroyum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Talgildu Føroyar, sum partur av Gjaldstovuni, skulu umsita talgilda samleikakortið.
Mett verður, at almennir stovnar og kommunur, við at knýta talgilda samleikakortið til sínar egnu fakskipanir, kunnu effektivisera umsitingina og minka um tørvin á manuellari handfaring í umsitingini. Ynskir stovnur ella kommuna at knýta talgilda samleikakortið í egnar fakskipanir, so ber einstaki stovnurin ella kommunan kostnaðin av hesum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður, at talgilda samleikakortið verður til gagns fyri fyritøkur, felagsskapir o.o., ið hava tørv á at tryggja, at ein persónur hevur ávísan aldur ella býr ávíst stað, t.d. í samband við søluav sigarettum ella alkohol, atgongd til dansistøð o.a. Ynskja fyritøkur at knýta talgilda samleikakortið í egnar fakskipanir, so ber einstaka fyritøkan sjálv kostnaðin av hesum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Talgilda samleikakortið kann hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum, eitt nú fyri fólk á útoyggj, t.d. ber til hjá Strandferðslan at síggja, hvør býr á útoyggj og ikki, og soleiðis málrætta avsláttarskipanir ella forrættindi umborð á ferju ella bussi.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er mett í mun til Hoyvíkssáttmálan, Mannarættindasáttmálan og ST sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek.

Hoyvíkssáttmálin:
Tað er onki í lógaruppskotinum, sum er í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

Mannarættindasáttmálin:
Neyðug fyrilit verða tikin í Talgildu Føroyum sum heild, so loysnin verður gjørd í samsvari við Mannarættindasáttmálan.

ST sáttmálin um rættindi hjá teimum, ið bera brek:
Uppskotið hevur fyrilit fyri ásetingunum í ST sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek, tí eingin skal so vítt gjørligt, verða forðaður í at fáa almenna talgilda samleikakortið.

Talgilda samleikakortið skal vera brúkaravinarligt og lætt atkomuligt hjá teimum, ið hava skerdar førleikar, so sum blind, sjónveik, deyv, tunghoyrd og onnur. Hetta skal tryggjast við at fylgja altjóða leiðreglunum um atkomu, WCAG (Web Content Accessibility Guidelines).

2.9. Markaforðingar
Mett verður ikki, at lógaruppskotið elvir til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Ikki viðkomandi.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Í § 5 fær landsstýrismaðurin heimild til at áseta reglur um at útflýggja talgilda samleikakortið í fysiskum formi.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Við lógaruppskotinum fær talgilda samleikakortið støðu sum alment talgilt samleikakort í Føroyum. Endamálið er, at talgilda samleikakortið við lógini verður viðurkent í samfelagnum sum samleikaprógv. Henda heimild skal tryggja, at talgilda samleikakortið fær stóra útbreiðslu, og at tað ikki verður víst aftur av almennum stovnum o.ø. við tí grundgeving, at tað er ókent ella ikki hevur somu søguligu støðu sum onnur samleikaprógv, t.d. passið og koyrikortið.

Til § 2

Stk. 1.
Við hesum verður yvirskipaða ábyrgdin av at umsita talgilda samleikakortið formliga løgd hjá avvarðandi landsstýrismanni.

At umsita talgilda samleikakortið merkir m.a. niðanfyristandandi:

At gera talgilda samleikakortið atkomuligt í samfelagnum
Landsstýrismaðurin syrgir fyri, at talgilda samleikakortið er atkomuligt t.d. við:

- at loysnin er atkomulig allar dagar í árinum, alt døgnið
- at loysnin eisini kann brúkast av persónum við serligum avbjóðingum. Hetta verður gjørt við at miða eftir, at WCAG (Web Content Accessibility Guidelines[1]) krøv verða hildin í mest møguligan mun
- at kunning um talgilda samleikakortið kemur út um alt landið

At tryggja at talgilda samleikakortið er trygt
Landsstýrismaðurin syrgir fyri, at talgilda samleikakortið er trygt t.d. við:

- at gagnnýta trygga undirstøðukervið hjá Talgildu Føroyum við Samleikanum, Vanganum og Heldini
- at hava støðugt KT eftirlit við loysnini
- at hava støðugt eftirlit við veitarum og undirveitarum

At tryggja at talgilda samleikakortið lýkur galdandi lóggávu
Serligur dentur verður lagdur á, at talgilda samleikakortið lýkur krøvini í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).

Loysnin er ment eftir "dátuvernd ígjøgnum sniðgeving" meginregluni. Hetta sæst m.a. í, at brúkarin sjálvur kann stýra, um hann vil deila sítt p-tal ella bústað, alt eftir um hann metir, um hetta er viðkomandi ella ikki í einstaka førinum.

Stk. 2.
Við hesum verður heimild fingin til vegar at heinta og útflýggja upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum. Talan er í høvuðsheitum um vanligar persónupplýsingar, men eisini um p-talið, ið hevur serliga verju sbrt. løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).

[1] https://www.w3.org/WAI/standards-guidelines/wcag/

Talgilda samleikakortið inniheldur í minsta lagi navn, aldur, p-tal og bústað.

Til § 3
Tað er sjálvboðið at fáa sær talgilda samleikakortið.

Orsøkin til, at tað er krav at hava talgilda samleikan (vanliga bert nevndur Samleikin) fyri at fáa talgilt samleikakort, er, at neyðugt er at eyðmerkja persónin, soleiðis at tað er rætti viðkomandi, ið fær atgongd til sítt egna talgilda samleikakort.

Samleikin er trygdargóðkendur í mun til altjóða standardin ETSI 319 411-1, og er trygdin tískil í hásæti.

Fyri at fáa Samleikan skal ein persónur:
- vera minst 13 ár
- hava p-tal
- kunna prógva sín likamliga samleika, t.d. við passi ella koyrikorti

Heimildin at viðgera persónupplýsingar hjá brúkarunum av talgilda samleikakortinum er § 2, stk. 2 í hesum lógaruppskoti, § 8, stk. 1, nr. 5 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin) um myndugleikaútinnan og § 16, stk. 1 løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin) um viðgerð av persónstalinum.

Brúkarin skal vera væl kunnaður um, hvussu hann skal brúka samleikakortið á rættan hátt og um, hvussu hansara persónupplýsingar verða viðgjørdar. Hetta verður gjørt í brúkstreytunum, ið brúkarin skal góðkenna fyri at gerast brúkari av talgilda samleikakortinum. Innihaldið í brúkstreytunum skal eisini tryggja, at kunningarskyldan sbrt. §§ 23 og 24 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin) verður hildin.

Um ein persónur velur at vísa sítt talgilda samleikakort fram, har t.d. p-talið sæst, men tað ikki verður skrásett av nøkrum, so er ikki talan um viðgerð av persónupplýsingum. Verður p-talið hinvegin skrásett, so er tann fyritøka ella myndugleikin, ið skrásetur, dátuábyrgdari, og skal tá m.a. halda reglurnar fyri viðgerð av persónstalinum, sbrt. § 16 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).

Til § 4
Foreldur kunnu hava eintak av talgilda samleikakortinum hjá sínum ómyndugu børnum. Endamálið við hesum er, at foreldrini kunnu umboða síni børn, tá hesi hava tørv á at geva seg til kennar í samband við eina tænastu, t.d. tá hesi skulu prógva sín bústað fyri at fáa avsláttur frá Strandferðsluni, fáa avsláttur til frítíðarvirksemi frá kommununi o.a.

Hentleikin at umboða síni børn verður ikki við í fyrstu slepping av talgilda samleikakortinum. Miðast skal tó eftir, at hetta verður partur av loysnini skjótast gjørligt, soleiðis at ágóðin av talgilda samleikakortinum kann gagnnýtast til fulnar.

Til § 5

Til stk. 1.

Talgilda samleikakortið er eitt kort á eini app. Men tað eru persónar, ið ikki kunnu ella vilja luttaka í tí talgilda heiminum. Endamálið við hesi grein er, at landsstýrismaðurin skal kunna geva hesum persónum eitt fysiskt eintak av tí annars bert talgilda samleikakortinum.

Landsstýrismaðurin skal áseta nærri reglur um fysiska samleikakortið, undir hesum reglur um trygd.

Til stk. 2.
Orsøkin, at landsstýrismaðurin kann veita undantak til kravið um talgildan samleika fyri at fáa fysiskt samleikakort, er, at kravið um talgildan samleika kann vera orsøkin til, at persónar ikki kunnu fáa talgilda samleikakortið. Fyri at útflýggja eitt fysiskt samleikakort, verður heimild tí givin til at seta onnur krøv til at eyðmerkja persónar. Tað kann t.d. vera, at krav verður sett um, at persónurin skal møta upp og vísa sítt pass ella koyrikort o.tíl.

Til § 6
Gildiskoma.

Fíggjarmálaráðið, 07. mars 2023

Ruth Vang
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarnotat
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Deyvafelag Føroya
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Ferðavinnufelagnum og KT-felagnum
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Landssjúkrahúsinum
Fylgiskjal 7: Ummæli frá SEV
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Útoyggjafelagnum
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Visit Faroe Islands